# Nú rekur á kíkin

HJALTI Í JÁKUPSSTOVU



Bjørn Kalsøe hevur helst ringar dagar, nú tilmælið um fiskidagarnar fyri 2007/2008 skal ásetast.

Fiskiskapurin eftir toski í 2006 var so vánaligur, sum sjáldan fyrr í friðartíð, og yvirlitstrolingarnar bæði seinasta heyst og í vár benda á, at toskastovnurin undir Føryum er so illa fyri sum ongantíð áður.

**Tilmælini í ár**

ICES mælir í tilmælinum fyri komandi fiskiár heilt frá at fiska tosk, tí støðan er so ring. Fiskirannsóknarstovan er samd við ICES um støðuna, men mælir til, ístaðin fyri at steðga heilt, at fleiri ymisk tiltøk verða sett í verk fyri at skerja fiskiskapin eftir toski so frægt sum gjørligt, uttan at nerva fiskiskapin eftir øðrum fiskasløgum ov nógv.

Fiskidaganevndin er ikki ósamd við niðurstøðuna, at toskastovnurin er illa fyri, og mælir til fleiri tiltøk, tó ikki so víttgangandi sum tey hjá Fiskirannsóknarstovuni. Bæði reiðarafelagið og útróðrafelagið siga, at fylgja vit ráðunum frá ICES og Fiskirannsóknarstovuni, so kappa vit høvdið av vinnuni. Kjartan Hoydal heldur, sum eg lesi hansara kronikkir í Dimmu, at fiskidagaskipanin var so væl gjørd av fyrstani tíð, at okkum nýtist einki at gera, fyrr enn vit hava talfest broytingarnar í fiskievni hjá fiskiskipaflotanum í tíðarskeiðnum 1986-1995. At vit kunnu forkoma toskastovninum samstundis, tykist ikki at ræða hann.

**Søgulig dømi og óttin hjá ICES**

Tað eru fleiri dømi um, at fiskastovnar eru fiskaðir niður og ikki hava fótað sær aftur í nógv ár. Best kendu dømi hjá okkum er norðhavsildin, ið varð burtur í 25 ár, og toskurin í New Foundlandi, ið nú hevur verðið burtur í 15 ár. Fiskifrøðingar flestir eru tí samdir um at mæla til fyrivarni, tá veiðitrýstið er ov høgt, og tá stovnarnir verða ov smáir. Verða gýtingarstovnarnir mettir so smáir, at gýtingin kann vera í vanda, verður mælt til heilt at steðga fiskiskapinum, til støðan er batnað. Hetta er støðan fyri toskastovnarnar undir Føroyum, og tí kann ICES sambært altjóða fyrivarnisregluni ikki koma við øðrum tilmæli, enn teir gera.

**Tilmælini frá Fiskirannsóknarstovuni**

Fiskirannsóknarstovan hevur í fleiri ár mælt til at minka talið av fiskidøgum, serliga eftir toski. Fiskiskapurin hevði tá gjørst lívfrøðiliga burðardyggur, og hevði lønsemi í fiskiskapinum tá kunna verið betur. Vit høvdu fingið sama tonsatal uppá land við færri útreiðslum, tí vit í meðal høvdu fingið størri fisk, sum gevur betri prís, og sum er bíligari at framleiða uppi á landi.

Vit høvdu helst sloppið undan ógvusligu sveiggjunum í nøgd, og vit høvdu gagnnýtt ein størri part av framleiðsluni á føroyska økinum

**Lógin um vinnuligan fiskiskap**

Í lógini um vinnuligan fiskiskap undir Føroyum er ásett, at fiskiskapurin skal fara fram á burðardyggan hátt, bæði búskaparliga og lívfrøðiliga. Sum støðan er í toskastovninum í løtuni, ber illa til at siga, at fiskiskapurin er burðardyggur, og landstýrismaðurin brýtur helst lógina, um hann ikki kemur við einum uppskoti, sum ger fiskiskapin burðardyggan. Og við tilmælunum frá ICES bæði í ár og árini frammanundan, ber heldur ikki til at marknaðarføra tosk undan Føroyum sum veiddan á burðardyggan hátt.

Álitið á, at føroyskur fiskiskapur yvirhøvur er lívfrøðiliga burðardyggur, kann gerast ringt at verja, so tað er trupult at vera landstýrismaður í hesum døgum.

# Ólavsøkukórið farið undir venjingar

ÓLAVSØKA

*Tíðindaskriv*

Alt síðan 1930-árini hevur kórsangur undir Tinghúsinum í sambandi við skrúðgonguna ólavsøkudag verið fastur táttur í ólavsøkuhaldinum. Fram til miðskeiðis í 60-árunum var tað Havnar Sangfelag – í fyrstani manskór, síðani meira blandað kór - sum tók sær av hesum íkasti til stevnuhaldið. Útvarpskórið - seinni Havnarkórið – helt fram, har gamla sangfelagið slepti; men tey seinastu brátt 40 árini hevur ynski verið at fáa sangarar helst úr øllum landinum at verða við hesa hátíðarløtu á tjóðardegi føroyinga.

Her sum aðrarstaðir økist á hvørjum ári talið av stevnum og summartiltøkum av ymsun slag. M. a. tí hevur kórsambandið í ár valt at hava bert tríggjar fyrireikandi venjingar. Fyrsta venjingin var seinasta sunnudag, har væl kom burturúr; men ynskiligt er, at ein enn fjølmentari sangaraskari møtir til tær báðar seinnu venjingar: í Kommunuskúlaskálanum nú sunnudagin kl. 15.00 – 18.00 og í Læraraskúlahøllini mikukvøldið 25. juli kl. 19.00 – 22.00.

Nú tá kirkjan á ólavsøku í ár umsitingarliga kemur á føroyskar hendur verður serligur dentur lagdur á tætta sambandið millum gudshaldið og fólksligu løtuna kring Tinghúsvøllin. Skráin verður annars eftir sama leisti sum undanfarin ár við m. a. føstu kvøðuni til høvuðsstaðin og tjóðsanginum, har alt fólkið fær høvi at syngja við; men nevnast kann eisini fyrstaframførsla av gjøgnumkomponeraðum satsi til nýggjari føroyskt sálmalag. Eisini óalmenna hugnaløtan hjá kórinum aftaná verður umframt vælkendu summar- og tjóðskaparslagarnar merkt av onkrum meira forkunnugum.

# Vikuskifti í summarfrí

**Næstu fýra vikurnar verður vikuskiftisinnleggið í Sosialinum í summarfrí. Men vit fara kortini at prenta vikuskiftistilfar í blaðnum. Vikuskifti verður aftur í blaðnum fríggjadagin 24. august.**




**Summarfrí**

Frisørsalongin á Høgabóli er stongd vegna summarfrí frá 30. juli til 20. august.

**Jógvan Hansen**

**Harrafrisørur · Tel 44 75 75 · Runavík**

# *So syngja teir*



1.
Hevur tú skonkt tí ein tanka
at man kann ”stjæla” ein heilan banka
og síðani ”forera” hann burt
tú selur fyri lítið
so stórt er vinningsbýtið
tað er lættari enn tú trýrt.

2.
Jú sig við teir ið stýra
at tvey pluss tvey er fýra
so fær tú teir at hoppa upp á alt
sjalvt um tú mást lúgva
teir hvørjum orði trúgva
teir klovnarnir, ið tú hevur valt

Niðurlag!
So syngja teir í Tinganesi
eitt met vit hava gjørt
heimsins størsta bankarán
er nú gjógnumført
so Ronald Biggs ”Go home”
tú hevur ongan kjans
vit bjóða kunnu aftur
til gullkálvadans.

Outro!
Men um alt á høvdið vendur
teir vaska sínar hendur,
og siga.
Mamma, mamma tað var ikki eg
pamparnir teir lumpaðu meg
so ríkari bleiv tann ríki
og so flenti teir í kíki

Orð/lag Anfinn Nielsen. Juli 2007

NORMEK



**P/F Normek søkir eftir**

**skrivstovufólki**

**til at byrja 1. august**

Arbeiði umfatar bókhald, lønarskipan, og telefon móttøku.

**Førleikar tínir:**
Dentur verður lagdur á, at tú ert fyrikomandi, ágrýtin og kanst arbeiða sjálvstøgu/r

**Løn:**
Lønin verður ásett eftir avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og ummælum til:

**P/F Normek**
Tróndagøta 63
FO-512 Norðragøta

og skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 25. Juli 2007.

Vilt tú vita meira kanst tú ringja á 582002, Erling Jacobsen